
Nurmes, Finnland




# VILT TÚ VIÐ TIL NOREG?

**“Unge sprogpiloter i Norden” er eitt samstarv millum skúlar í Danmark, Svøríki, Noregi, Finnlandi og Føroyum.**

Endamálið er at kenna sínar grannar innan mál og mentan. Vitjað verða í øllum londum. Fyrst í oktober 2023 høvdu vit vitjan í Føroyum, í apríl 2024 vóru vit í Finnlandi. Í september 2024 fara vit til Noregs.

Fyri hvørja ferð er eitt evnið, sum øll londini arbeiða við, einsæris og í felag. Næsta evni verður sálarlig heilsa.

**16. til 20. september fara vit til Askøy, Bergen. Tit skulu búgva hjá norskum næmingum/familjum. Seks næmingar og tveir lærarar úr SvS eru við.**

**Um hetta hevur tín áhuga kanst tú senda okkum eina umsókn har tú greiður okkum frá:**

1. Hvør tú ert
2. Hví tú ert eitt gott sendifólk
3. Tíni hugskot um, hvussu vit siga øðrum í SvS frá ferðini. T.d. poddvarp, film, blaðgrein osf.

**Umsóknin kann sendast til sd2903b2@skulin.fo áðrenn 30 mai 2024.**

Vit gleða okkum at hoyra frá tær.
Birita Sigmundsdóttir og Sara L. Dybvad

**Krøv**

- Er áhugað/ur í máli og mentan
- Dámar at møta nýggjum fólkum
- Vilt deila tína vitan við onnur
- Gongur í 8.-10. flokki eftir summarfrítíðina
- Hava loyvi frá foreldrum/verjum
- Eiga eitt pass


Askøy, Noreg


Nurmes, Finnland